B36-ararnir kundi fegnast um sætta sigurin á rað í landskappingini, og nú ganga liðini í 1. deild í trimum bólkum

Mynd: Álvur Haraldsen

Oddaliðini fingu øll fult, og botnliðini taptu øll. B36 er best eftir níggju tey fyrstu umførini, men skiftandi gongdin hevur boðað frá, at tað framvegis er møguleiki fyri, at okkurt, sum nú vendir upp, seinni kann fara at venda niður

Nú gongur kappingin í trimum bólkum

9. UMFAR SAMANUM

Jóannes Hansen

Toppliðini eru øll stórir favorittar var yvirskriftin, tá ið 9. umfarið leygardagin varð undanumrøtt her á síðunum. Toppliðini vóru B36, NSÍ og HB. Tey vunnu øll sínar dystir, og harvið eru tey framvegis topplið. NSÍ er farið í summarfrí, og í annaðkvøld verður greitt, um teir skulu halda frí á silvur ella bronsu plássinum. Tað valdast um, hvussu tað fer at hilnast hjá HB í annaðkvøld. Tá skulu føroyameistararnir til Miðvágs, og tá mugu teir aftur finna seg í at vera roknaðir sum favorittar. Um HB fer at megna javnleik ella at vinna ímóti FS Vágum, so verða teir næstovast í summarsteðginum. Um FS Vágar fer at vinna, so verður NSÍ næstovast, og HB verður á triðja plássinum. Hetta er treytað av, at B36 megnar sína uppgávu.

Í annaðkvøld eru umframt FS Vágar hesir tríggjar dystirnir á skránni: KÍ-GÍ, B36-VB og B68-EB/Streymur.

Eftir níggjunda og síðsta umfarið í fyrra partinum av hesum kappingarárinum vísir støðutalvan, at kappingin er flokkað í tríggjar partar. Trý lið eru í toppinum, trý í botninum, og so eru hini fýra so at siga í einum bólki fyri seg.

Toppurin

Mest sannførandi av teimum trimum toppliðunum var sunnudagin B36. Eftir løku fyrstu umførini hevur B36 rættuliga fingið luft undir veingirnar. B36 sigurin á GÍ var tann sætti hjá árstalsfelagnum upp í slag og burtursæð frá skrædlinum, sum teir stóðu fyri ímóti KÍ, so var talan um stórsta sigurin hjá B36 í ár. B36 hevur ikki mist stig, síðani teir 29. mai taptu 1-0 á Svangaskarði, og teir hava neyvan nakað ímóti, at teir nú verða mettir sum fremsta boðið upp á FM heitið. Mikukvøldið eiga teir heimavøll ímóti VB, og soleiðis sum gongdin hevur verið nógvu tær seinastu ferðirnar, so verður talan um mest óvæntaða úrslitið í kappingini, síðani EB/Streymur í 2. umfari vann á B36, um tað ikki fer at eydnast B36 í annaðkvøld í Gundadali at leggja trý stig millum seg og NSÍ.

HB verður favorittur í Miðvági, og tað er nógv, sum bendir á, at teir fara at halda frí frá landskappingini eitt stig aftanfyri B36. Men avrikini og úrslitini tær seinastu ferðirnar siga, at tað ber betri til at tosa við meistaraliðið, enn tað frammanundan kanska hevur verið roknað við.

NSÍ hevði stórt stríð í Miðvági, har tað var nógv meiri striltið hjá teimum at fáa øll stigini, enn tað frammanundan við støðutalvuni í huga kundi roknast við. Men NSÍ hevði hepnið og hugburðin, sum skal til fyri at vinna. Einki er at ivast í, at HB spælararnir fara at prenta veruleikan, sum gekk fyri seg í Miðvági sunnudagin, inn í seg sjálvar, áðrenn teir í morgin fara undir Vestmannasund.

Í fyrsta umfarinum eftir summarsteðgin skal NSÍ í Gundadal at spæla ímóti HB. Tá fæst at síggja, um tað verður HB ella NSÍ, sum verður størsti avbjóðarin hjá B36. Í sekstanda umfarinum skal B36 til Runavíkar, og í seytjanda umfarinum verður grannastríð í Gundadali, og úrslitið í teimum báðum dystunum fer ikki at hava so lítlan týdning fyri, hvat skáp FM heitið skal enda í.

Botnurin

Støðutalvan boðar frá, at avgerðin um, hvør skal flyta beinleiðis niður í 2. deild, skal finnast millum Skála, VB og FS Vágar. Skálamenn megnaðu ikki sunnudagin at halda fram á Eiði, har teir sleptu á heimavølli ímóti FS Vágum mikukvøldið.

Felags fyri botnliðini er, at avrikini hjá teimum hava verið rættuliga óstøðug. Vágamenn eru illa sperdir,og teir vístu góðan hugburð, men tað eydnaðist teimum ikki at fáa úrtøku. Sovorðið kostar sinniliga. Tískil er spurningurin, um teir fara at megna at menna seg aftur, áðrenn HB kemur vestur.

VB hevur fleiri ferðir staðið seg væl á Toftum, men hesa ferð fingu teir einki. Nú trý lið av álvara eru fyri seg sjálvi í botninum fara innanhýsis uppgerðirnar teirra millum at hava alstóran týdning. Tann fyrsta av hesum slagnum verður 10. august, tá ið VB skal til Miðvágs, tann næsta verður 21. september, tá ið VB skal spæla á Skála, og í næstsíðsta umfarinum fær FS Vágar vitjan av Skála. Tað vil altso siga, at VB skal spæla á útivølli ímóti hinum báðum í botninum. Tað verður strevið hjá vágbingum, men teir hava ofta vístseg at vera stinnar á Vágseiði - eisini ímóti toppliðunum - og tað kann vísa seg at gerast bjargingin hjá teimum.

Miðjan

Gøtumenn eru millum teirra sum í løtuni hava vánaligastu úrtøkuna. Tær seinastu nógvu ferðirnar hevur tað bara eydnast teimum at vinna á heimavølli ímóti VB, og í løtuni er tað einki í GÍ spælinum, sum bendir á, at tað skal bera teimum til eftir summarsteðgin at lyfta seg upp millum oddaliðini. Tað hava teir annars ofta megnað. Kortini er fjarstøðan so mikið lítil, at GÍ við sigri í Klaksvík í annaðkvøld kann nærkast NSÍ.

Men um KÍ megnar at framala sama hugburðin ímóti GÍ, sum teir gjørdu ímóti HB sunnudagin, so verður uppgávan hjá GÍ stór. Hjá klaksvíkingum verður tað spennandi at fara á vøllin í morgin. Avrikini seinastu vikurnar hava verið sera óstøðug. Ímóti HB var liðið rættuliga ólíkt tí, sum spældi í Runavík. Hesa ferð tóktust allir spælararnir at vera fullførir, og tað er fyrsta fyritreytin, um hugast skal um góð úrslit og harvið fleiri stig. KÍ hevur tapt ímóti øllum teimum trimum oddaliðunum, og tað hevur kostað nógv. Sunnudagin var um reppið, at liðið fór fyri bakka, tá ið HB var frammanfyri 2-0 og bara góð bjarging hjá málverjanum forðaði triðja HB málinum. Tað vendi hjá KÍ, og so er spurningurin, um teir megna at byggja víðari á gongdina síðsta tíman ímóti HB.

B68 er nú nummar fýra. Ímóti EB/Streymi mikukvøldið hava teir møguleika at koma NSÍ so mikið nær, at tað fer at bera til at vinna munin aftur í einum umfari. Tí fara bæði teir og EB/Streymur at hava nógv at spæla fyri, tá ið liðini fara at hittast á Svangaskarði í annaðkvøld. EB/Streymur hevur við sigrinum á skálamonnum tikið risastig úr botninum. Fyri fyrstu ferð, síðan teir gjørdust partur av bestu deildini, kunnu teir rokna seg at vera partur at miðjuni.

Hesa ferð var talan um tveir útisigrar og tríggjar heimasigrar. Úrslitini higartil have ikki altíð verið, sum tað hevði verið roknað við, og tað ber við sær, at tað verður spennandi í annaðkvøld og aftur, tá ið tað eftir ólavsøku verður farið undir átta tey síðstu umførini.

Illa sperda HB slapp við skrekkinum

Janus Joensen úr HB og Arnold Joensen úr KÍ dystast her um bóltin. HB megnaði at hála ein tepran sigur í land

Mynd: Símun á Høvdanum

Hóast teir síðsta stóra tíman vóru hamskiftir og við stórum trýsti løgdu verjuleikarnar hjá mótstøðumonnunum út á bera jól, so megnaði KÍ ikki at taka tað aftur, sum teir mistu fyrstu løtuna, tá ið útlit vóru fyri stórsigri til HB

KÍ-HB

Jóannes Hansen

Tað var so dramatiskt, sum tað næstan bara kann vera, tá ið tað eru KÍ og HB, sum spæla. Tá ið Niklas á Líðarenda, sum megnaði torgreiddu uppgávuna sera væl, bríkslaði fyri síðstu ferð, var tað væl skiljandi, at HB spælararnir vóru ovurfegnir, og at heimamenninir høvdu hug at hanga eitt sindur við høvdinum.

Eftir at talan fyrsta stóra korterið av álvara hevði givið ábendingar um skipbrot hjá illa sperda heimaliðnum, og spøkilsið frá 7-1 HB sigrinum á norðoyastevnu í 1989 tóktist skula broytast til friskan veruleika, so koppaðu leiklutirnir fullkomuliga á, og síðsta stóra tíman var tað heimaliðið, sum var greitt omaná.

Stríðshugurin og áræðið, sum t. d. í Runavík mikukvøldið vóru púra burtur, blómaðu. Klaksvíkingarnir jagstraðu mótstøðumenninar, sum kendu seg so mikið kroystar, at teir ongantíð funnu stevið aftur. Teir høvdu annars tókst rættuliga sannførandi fyrsta korterið, og teir høvdu tvær ferðir fingið fulla úrtøku burturúr. Tað var eisini um reppið, at teir øktu til 3-0, men Kartin Joensen, sum var tryggur í verjupartinum, men hevði ávísar trupulleikar, tá ið viðspælararnir vildu hava hann at taka lut í fótbóltsspælinum, tveitti seg og fekk bent langskotsroyndini hjá Martini Christiansen til horna.

At HB so tíðliga og í sovornari støðu ikki hevði marginalirnar við sær, mundu teir ikki halda bilaði. Teir vóru á odda 2-0, og í báðum førunum vóru teir meistarar fyri at gera fulla nyttu burturúr, tá ið spildurnýggja heimaverjan ikki hevði funnið røttu støðurnar.

Í tí fyrra førinum gav KÍ innkast í vinstru. Rúni Nolsøe sendi innfyri, og eftir tvær ferðir aftur og fram eydnaðist Tór-Ingar Akselsen, sum var sera væl upplagdur fyrtu løtuna, úr eitt sindur spískum í høgru at smekka upp undir nettakið. KÍ var skelkað, HBarnir tóktust kunna gera, sum teir vildu, og tá ið eitt korter var farið, fingu teir eitt fint mál aftur. Tór-Ingar Akselsen lyfti uttanfyri brotsteigar samankomingina í vinstru mitt innfyri málið, har blanki Rógvi Jacobsen, sum í frástøðuni hjá Andrew av Fløtum var miðframherji, valdi við høvdinum at leggja tvørtur um aftur til uppaftur meiri leysa Rúna Nolsøe, sum setti krúllin undir, og so var 2-0 og alt talaði fyri stórum útisigri. Tað var merkisvert, hvussu leysur Rógvi Jacobsen var, og tað var eisini merkisvert, at tað var, tá ið álopsmaðurin royndi at koma í góða støðu, at John Ryan fór um koll og ongantíð reisti seg aftur á vøllinum.

Funnu íblásturin og opinberaðu veikleikarnar

KÍ royndi desperat at koma aftur í aftur, men teir skuldu ígjognum ein skelk afturat, áðrenn tað eydnaðist. John Ryan, sum hevur vant nógv síðstu tíðina, og sum er um at koma fyri seg, varð skaddur og varð borin av vøllinum. Leon Bjartalíð varð settur inn á miðvallarplássið í vinstru, og Símun Joensen, sum tóktist trívast væl á miðvøllinum, varð settur aftur í vinstra verjuborð.

Men KÍ fekk fatur á rætta endanum. Arnhold Joensen, sum fyri fyrstu ferð í langa tíð var á miðvallarplásinum í høgru, fann saman í gamla samanspælið við Harley Bertholdsen, Atli Danielsen og Jan Joensen vunnu nógv á miðvøllinum, og tá ið verjuparturin hjá HB hevði verið undir trýsti nakrar ferðir, funnu heimamenninir út av, at mótstøðuliðið væl og virðiliga var at tosa við.

Í høgra verjuborði og í miðverjuni hjá HB var ótryggleikin so mikið stórur, at tað gav Ove Nysted og Hjalgrími Elttør blóð á tonna. Teir vunnu nógvar nærdystir, og teir trýstu mótstøðumenninar at gera mistøk, sum bóru rættuligt óróg í HB verjuni við sær.

Tá ið tíggju minuttir vóru eftir av fyrra umfarinum gav KÍ trýstið úrtøku. Hjalgrím Elttør rak uttanvert brotsteigin og úr vinstru upp á tvørs, so smekkaði hann til, Pól Næs Joensen tveitti seg, men var ov stuttur, og bólturin fór umvegis handaru stólparótina og í málið.

Hepnið fylgdi oddaliðnum

Eftir steðgin legði KÍ fyri í sama giri, sum teir leingi høvdu spælt í. Sum hálvleikurin leið, sleptu teir eitt sindur meiri í verjupartinum. Tað bar onkrar møguleikar fyri HB kontraáloppum við sær. Ta eina ferðina var Rógvi Jacobsen púra blankur, tá ið hann eftir innlegg úr høgru lyfti upp um málverjan, men bólturin fór skeivu megin stólpan.

Bæði í 1. og aftur í 2. hálvleiki kolldømdi dómarin KÍ mál eftir deyðbóltsstøður, tí hann metti KÍ spælararnar hava verið óregluligar ímóti HB málverjanum. Tað gjørdi ikki prutlið undir lokinum minni. Intensiteturin var fantastiskur. Aleksander Djordjevic, sum hevði verið í miðverjuni undir liðini á Niclasi Niclasen, ið var sera sannførandi, var í álopinum, har hann og Ove Nysted ofta vunnu luftdystirnar við Jan C. Dam og Símun Eliasen. Onkra ferðina bjargaði HB málverjin væl, fleiri ferðir dansaði bólturin fram ímóti málstrikuni, men KÍ fekk einki mál. Harvið noyddust heimamenninirat ásanna, at kostnaðurin av sera ússaligum fyrsta korteri hevði verið avgerandi. Men avrikið eigur kortini at bera betri vónir fyri framtíðini, enn tað var orsøk til eftir skrædlið í Runavík.

HB spælararnir vóru ovurfegnir. Eftir góða avrikið og vánaliga úrslitið mikukvøldið ímóti grannunum, kendu teir tað sum um, at nú høvdu avrik og úrtøka javnað seg. Men frustratiónirnar yvir strongdina í 2. hálvleiki lótu teir ganga út yvir seg sjálvar. Carsten From, sum frammanundan hevði tiltuskað sær gult kort, tóktist ikki vera í javnvág, tá ið hann í síðstu løtu, áðrenn sjøtul varð settur á teir fimm minuttirnar, sum dómarin hevði lagt afturat, hevndi seg inn á Símun Joensen, sum hevði sent bóltin víðari. Tað sá linjuverjin, dómarin vísti reyða kortið, og harvið hevði HB sektað seg sjálvt. Men tað skuggaði neyvan yvir gleðina, at tað hevði eydnast at vinna alt.

0-1: Tór-Ingar Akselsen 6.
0-2: Rúni Nolsøe 15.
1-2: Hjalgrím Elttør 36.

Dómari: Niklas á Líðarenda

KÍ: Kartin Joensen - Harley Bertholdsen, Niclas Niclasen, Alexander Djordjevic, John Ryan (Leon Bjartalíð, 18.) - Arnhold Joensen, Atli Danielsen, Jan Joensen, Símun Joensen - Ove Nysted, Hjalgrím Elttør

Gult kort: Atli Danielsen

HB: Pól Næs Joensen - Hans á Lag, Eli Thorsteinsson (Jan C. Dam, 46.), Símun Eliasen, Janus M. Joensen - Rúni Nolsøe, Hallur Danielsen, Martin Christiansen - Tór-Ingar Akselsen (Bjarni Jørgensen, 86.), Rógvi Jacobsen, Carsten From

Gult kort: Carsten From, Martin Christiansen

Reytt kort: Carsten From 90. (beinleiðis reytt)